# FSN nógv jørn í »eldinum«

**Á aðalfundi hjá Føroya Skipara-og Navigatørfelag týsdagin, greiddi Ellintur Abrahamsen, formaður felagsins, frá teimum málum, sum felagið hevur arbeitt við í farna ári**

AÐALFUNDUR
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Á aðalfundinum hjá Føroya Skipara-og Navigatørfelag, legði formaðurin, Ellintur Abrahamsen, fyri við at greiða frá sáttmálaviðurskiftum og ymiskum trupulleikum, sum hava stungið seg upp í hesum sambandi.

Hann greiddi eisini frá sersáttmála, sum felagið hevur gjørt fyri nýggja Skálaberg.

– Í løtuni eru samráðingar við Føroya Reiðarafelag um nýggjan sáttmála, og tríggir fundir hava verið millum feløgini. Ætlanin var at koma til eitt úrslit tíðliga í samráðingunum, men av ávísum orsøkum hava samráðingarnar drigið út.



*Ellintur Abrahamsen, formaður í Føroya Skipara- og Navigatørfelag*
Mynd: Jens Kr. Vang

Hann segði, at FSN legði síni krøv fram á fyrsta fundi.

– Men tá vóru reiðararnir ikki klárir við sínum krøvum – burtursæð frá, at teir søgdu seg ikki góðtaka nakað, sum kostar pening.

Ellintur segði, at Føroya Reiðarafelag á øðrum fundi, sum var millum feløgini, legði fram skrivligar viðmerkingar til krøvini hjá FSN – og kom við nøkrum krøvum.

Hann vísti eisini á leiklutir hjá felagnum í sambandi við uppskotið um loysn av trætum á arbeiðsmarknaðinum.

– Eg haldi, at feløgini eru samd um at fáa í lag greiðari setanarviðurskifti og uppsagnarreglur, segði formaðurin í FSN, sum eisini greiddi frá, hvussu samráðingarnar millum FSN og Reiðarafelagið fyri farmaskip høvdu gingið.

Ellintur greiddi eisini frá gongdini í samráðingunum, sum vóru millum FSN og fíggjarmálaráðið (FMR) um limir felagsins umborð á strandfaraskipunum og Magnusi Heinasyni.

Ein afturvendandi spurningur, sum viðgjørdur hevur verið á aðalfundum FSN's seinastu árini, er spurningurin um rættindini hjá fiskimonnum í ALS, og her hevur felagið ført drúgv rættarmál, sum Ellintur gjørdi nógv burtur úr á aðalfundinum.

Hann greiddi eisini frá stríðnum hjá felagnum at vinna limum sømdir í Dagpeningaskipanini, har neyðugt hevur verið at vent sær til Føroya Kærustovn við nøkrum málum, og hann greiddi eisini frá onkrum mál, har limur ikki hevur fingið frítíðarløn av útgoldnari vanlukkutrygging.



Ellintur segði, at felagið hevur heitt á Fiskimálaráðið um at dagføra sjólógina og sjómanslógina, har felagið metir, at tað týdningarmesta við sjómanslógini er at broyta hana soleiðis, at hon verður galdandi fyri fiskiskip á sama hátt sum fyri handilsskip.

– Munnliga hava vit fingið at vita, at málið verður tikið upp í nærmastu framtíð, segði hann.

Ellintur Abrahamsen tosaði eisini um viðurskiftini viðvíkjandi trygd á sjónum og um arbeiðsumhvørvið umborð á skipum.



*– Standa vit saman, eiga vit at vinna fram á, segði formaður í FSN, Ellintur Abrahamsen*
Mynd: Jens Kr. Vang

# Standa vit saman vinna vit fram á

**– Eg vóni, at limirnir skilja krøvini, sum sett eru í sáttmálasamráðingunum, sum hava verið og teimum, sum standa fyri framman, segði Ellintur Abrahamsen á aðalfundi í FSN**

AÐALFUNDUR
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Ellintur Abrahamsen, formaður í Føroya Skipara-og Navigatørfelag, segði á aðalfundi felagsins týsdagin, at FSN hevur havt eitt positivt rakstrarúrslit í farna ári.

Hann vísti á, at frá 1. desember eru tøku hølini hjá felagnum leigað útaftur, og tí metir leiðslan, at árið 2004/ 2005 eisini fer at hanga saman fíggjarliga, tó at onkrar ábøtur eru, sum mugu gerast.

### Skilja krøvini

Á aðalfundinum segði formaðurin seg vóna, at limirnir skilja krøvini, sum felagið hevur sett í farnum sáttmálasamráðingum – og í teimum samráðingum, sum standa fyri framman.

– Standa vit saman, eiga vit at vinna fram á, men standa vit ikki saman, er tap í hendi, segði hann.

Á aðalfundinum legði formaðurin dent á, hvussu umráðandi tað er fyri felagið og tess limir, at hesir gera vart við seg, tá ið teir meta seg ikki at hava fingið síni rættindi.

– At gera vart við seg, gevur felagnum besta møguleikan fyri at arbeiða víðari við málinum, segði hann.

Ellintur Abrahamsen segði seg vóna, at limir felagsins fáa eitt gott komandi ár, tá ið farið verður aftur til verka.

# FSN ynskir sáttmála við fleiri kommunur



**Felagið miðjar eftir at fáa fleiri kommunur at brúka sáttmálan fyri havnameistarar og havnaumsjónarmenn**

AÐALFUNDUR
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Á aðalfundinum hjá FSN greiddi Ellintur Abrahamsen frá, at sáttmálin, sum felagið hevur við Kommunala Arbeiðsgevarafelagið (KAF) fyri havnameistarar og havnaumsjónarmenn, varð endurnýggjaður við gildi frá 1. oktober 2003 og tvey ár fram.

Sáttmálin er galdandi fyri tær kommunur, sum ynskja at fylgja hesum sáttmála. Men tað eru bert tríggjar ella fýra kommunur, sum ynskja tað.

– Vit hava eftirhondini í mong ár havt sáttmála um havnameistarar og havnaumsjónarmenn í Fuglafjarðar kommunu, Runavíkar kommunu og Sørvágs kommunu. Roynt hevur verið at fáa aðrar kommunur at fylgja sáttmálanum, men tað hevur gingið striltið.

### Við aftur…

Ellintur vísti á, at Miðvágs kommuna eisini hevur gjørt av at fylgja sáttmálanum, men har er alt ikki komið uppá pláss enn.

– Fyrst í nítiárunum var sáttmálin eisini millum FSN og Nes kommunu, Sjóvar kommmunu, Tvøroyarar kommunu, Vestmanna kommunu og Skála kommunu, men eftir at sáttmálin varð uppsagdur í sambandi við árligar lønarsamráðingar, vildu hesar kommunur ikki endurnýggja sáttmálan.

Ellintur Abrahamsen segði, at FSN miðjar eftir at fáa hesar somu kommunur at brúka sáttmálan aftur.